




Serdagsstovnurin er landsstovnur undir Almannastovuni og er í høvuðsheitum ætlaður børnum undir skúlaaldur, sum hava álvarsligar atferðar- og tilknýtingartrupulleikar. Talan er um ein dagstovn, men møguleiki og pláss er eisini fyri samdøgurumlætting. Høvuðsbarnaverndarnevndin avger, eftir tilmæli frá barnaverndarnevndunum, hvørji børn eiga at fáa pláss á Serdagstovninum.

Høvuðsuppgávan hjá Serdagstovninum er at styrkja og menna tað einstaka barnið bæði sálarliga, sosialt og motoriskt, soleiðis at tað miðvíst kann verða arbeitt við, at barnið gerst ført fyri at koma aftur á vanligan dagstovn.

Serdagstovnurin er normeraður til 5 børn.

# Leiðari til Serdagstovnin fyri børn við atferðar- og tilknýtingartrupulleikum

Søkt verður eftir leiðara til Serdagstovnin at byrja skjótast til ber.

Høvuðsuppgávan hjá leiðaranum er tann dagliga fakliga og fyrisitingarliga leiðslan av Serdagstovninum. Leiðarin hevur ábyrgdina av dagligu fíggjarviðurskiftunum hjá Serdagstovninum við tilvísing til stjóran á Almannastovuni, sum hevur endaligu yvirornaðu ábyrgdina.

Leiðarin verður partur av einum toymi av stovnsleiðarum og verður harvið við til at menna tað tvørfakliga samstarvið saman við hinum stovnsleiðarunum innan barnaforsorgarøkið undir Almannastovuni.

Leiðarin skal tryggja, at tað einastaka barnið fær ta viðgerð, tí tørvar, og skal harumframt samskipa samstarvið millum stovnin, foreldrini og myndugleikarnar.

Søkt verður eftir persóni við viðkomandi útbúgving so sum sálarfrøðingur, pedagogur ella sosialráðgevi. Dentur verður lagdur á, at leiðarin, umframt viðkomandi fakliga útbúgving og royndir, eisini hevur leiðslu- og fyrisitingarligar royndir, góð samstarvsevni, er virkisfúsur og er opin fyri broytingum.

Leiðarastarvið er fulltíðarstarv, og verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Setanarøki er Almannastovan og stovnar undir henni. Núverandi setanarøki er Serdagstovnurin.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra, á telefon 35 35 10.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, møguligum viðmælum v.m., skal vera Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 6. desember 2006, kl. 12.00.

Send umsóknina til:
Almannastovuna
Smyrilsvegur 20
Postboks 3096
110 Tórshavn.
Vinarliga merkið brævbjálvan "Serdagsstovnur".

almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

KREA.FO - TEL 47 80 80




Altíð tað nýggjasta

www.sosialurin.fo